UTTAN ÚR HEIMI

Stúra fyri oljudálking

Í Danmark stúra bæði myndugleikar og umhvørvisfelagsskapir fyri veksandi dálkingarvandanum, nú russar um 14 dagar fara at økja oljuflutningin ígjøgnum Eystrasalt heili 40 prosent, so hann verður 42 milliónir tons um árið.

Danmark og onnur lond hava leingi roynt at finna eitt felags stev fyri at fyribyrgja dálking frá tí veksandi oljuflutninginum, men tað hevur verið striltið at koma á mál, tí russar hava lagt forðingar í vegin.

Russar hava í seinastuni arbeitt við at leggja eina nýggja rørleiðing til havnarbýin Primorsk, og teir ætla, at tann fyrsta oljan skal renna ígjøgnum leiðingina um 14 dagar. Sum er kunnu russar avskipa 30 milliónir tons av olju um árið við Eystrasalt, men tá tann nýggja leiðingin er liðug, verður orkan 42 milliónir tons um árið, skrivar Jyllandsposturin.

Men russar ætla ikki at gevast so, tí sambært stjóranum í felagnum Transneft er málið at kunna avskipa 62 milliónir tons av olju um árið við Eystrasalt. Tað fer at bera í sær, at 170.000 tons av russiskari olju skulu flytast við skipum ígjøgnum tey donsku sundini um dagin. Umhvørvisfelagsskapir stúra fyri, at ein stórur partur av oljuni verður fluttur við skipum, sum hava einkultan skrokk, og teir vilja tí vera við, at vandin fyri dálking er stórur.

Einki CIA í Evropa

Eitt uppskot um at stovna eina felags evropeiska fregnartænastu eftir amerikonskum leisti fekk ikki undirtøku á fundi ímillum innanríkis- og løgmálaráðharrarnar hjá ES-londunum hósdagin.

Tað var Eysturríki, sum legði uppskotið fram. Eysturríkska stjórnin heldur tað vera rætt at skipa eitt evropeiskt CIA, sum skuldi havt eftirlitið við yvirgangsfelagsskapum og forðað fyri, at fleiri lond ella felagsskapir fáa fatur á hópoyðingarvápnum.

Men uppskotið fekk ikki undirtøku. Írski løgmálaráðharrin, Michael McDowell, sigur, at tey evropeisku londini eiga at menna løgreglusamstarvið Europol heldur enn at skipa ein stovn afturat. Á einum tíðindafundi hósdagin segði McDowell, at "ein noyðist at læra at ganga, áðrenn ein dugir at renna". Írland hevur í løtuni formansskapin í ES.

Skylda meiri skatt

Sjálvt um eitt tað fyrsta stigið hjá donsku stjórnini var at lýsa skattasteðg, skylda danir meiri skatt nú enn frammanundan.

Ein uppgerð hjá donsku pantifútunum vísir, at hóast skattavaldið fleiri ferðir minti fólk á at rinda skattin, vaks eftirstøðan 137 milliónir krónur í fjør. Tað hevur við sær, at á nýggjárinum skyldaðu danir meiri enn seks milliardir krónur í skatti. Trý ár frammanundan var eftirstøðan 5,6 milliardir krónur.

Í seinnu helvt av nítiárunum gekk væl hjá dønum at rinda skattin, og eftirstøðan minkaði tá á hvørjum ári, men síðani 2000 hevur tað gingið tann øvugta vegin sæst í kanningini hjá pantifútunum.

Gass til Pólands

Norska Statoil hevur skrivað undir ein sáttmála við pólendingar, sum skulu hava 2,5 milliardir rúmmetrar av gassi frá felagnum næsta ár ella í 2006.

Sum er keypa pólendingar eina hálva milliard rúmmetrar av gassi frá Statoil um árið, men seinasta heyst vildu pólendingar hava meiri. Síðani hava samráðingar verið um handilin, og nú er sáttmálin undirskrivaður.

Álvarssom njósnaragøla í Ísrael

Elhanan Tannenbaum. Bleiv hann burturfluttur, ella fór hann sjálvboðin til Libanon at avdúka ísraelsk hernaðarloyndarmál?

Tann 29. januar kom vinnulívsmaðurin Elhanan Tannenbaum aftur til Ísraels eftir at hava sitið fangi hjá Hizbollah í trý ár. Nú verður hildið, at hann var ongantíð fangi, men fór sjálvboðin, og at hann hevur avdúkað ísraelsk hernaðarloyndarmál

NJÓSNING
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Elhanan Tannenbaum fekk eina hjartaliga móttøku, tá hann kom til Ísraels eftir at hava sitið fangi hjá Hizbollah í Libanon í trý ár. Men síðani hevur einki verið at sæð til hansara. Orsøkin er, at hann hevur verið til avhoyringar at kalla alla tíðina, síðani hann kom aftur.

Sambært ísraelska blaðnum Maariv hava myndugleikarnir illgruna um, at Tannenbaum hevur ikki sagt sannleikan. Keldur hjá trygdartænastuni siga fyri blaðnum, at alt ruggar ikki rætt.

Elhanan Tannenbaum hevur greitt frá, at hann varð tikin og burturfluttur, meðan hann var í Dubai, og at burturflytararnir fóru til Libanon við honum. Men hesum trýr trygdartænastan ikki.

Hetta er annars ikki fyrstu ferð, at ivi hevur verið um søguna hjá Elhanan Tannenbaum. Ísraelskir fjølmiðlar hava fyrr spurt, hvat maðurin gjørdi í einum arabiskum landi. Síðani heimkomuna hava fjølmiðlarnir aftur gjørt nógv burtur úr málinum, og keldurnar í trygdartænastuni hava heldur ikki verið serliga tættar.

At ísraelsku myndugleikarnir meta málið álvarsamt kemst av, at Elhanan Tannenbaum var oberstur í ísraelska eykaherinum, og tí hevur hann havt atgongd til upplýsingar, sum Ísrael fyri alt í verðini ikki vil lata erkafíggindan Hizbollah fáa fatur á. Hósdagin skrivaði Maariv frá keldum í trygdartænastuni, at Tannenbaum eftir øllum at døma hevur svikið sítt land, og at hann helst samstarvaði við Hizbollah, longu áðrenn hann fór til Libanon.

Vit skulu velja heimsins undurverk

Á alnótini ber til at atkvøða um, hvat vit halda vera heimsins størstu undurverk í nýggjari tíð

UNDURVERK
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Fyri meiri enn 2000 árum síðani vórðu heimsins sjey undurverk útnevnd, men nú vil ST-stovnurin UNESCO hava okkum at velja av nýggjum.

Tað ber til at atkvøða á adressuni www.n7w.com, og higartil hava umleið 16 milliónir fólk skulu atkvøtt. Ætlanin hjá UNESCO er, at ímillum 60 og 100 milliónir fólk skulu atkvøða, áðrenn freistin er úti við árslok næsta ár.

UNESCO hevur sett 25 evni, sum veljast kann ímillum, men tað ber eisini til at koma við sínum egna uppskoti. Ímillum evnini, sum nú eru á listanum, kunnu nevnast Eiffeltornið og Versailles í Fraklandi, Empire State Building í USA, moskan Hagia Sophia í Turkalandi, Taj Mahal í India, Kreml í Russlandi, Petra-templið í Jordan og La Sagrada-kirkjan í Spania.

Betala fyri at fara í býin

Tað er ikki ókeypis hjá starvsfólkum hjá býráðnum í Havn at fara í býin. Men nú skulu tey eisini dragast í løn fyri at fara til lækna, til tannlækna og at fylgja líki, uttan tá ið talan er um næstu skyldfólk

STARVSFÓLKAPOLITIKKUR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Starvsfólk í Tórshavnar Býráð verða drigin í løn, tá ið tey fara í býin í privatum ørindum.

Tað sigur Niels Uni Dam, sum sjálvur arbeiðir hjá býráðnum.

Seinastu tíðina hevur nógv verið frammi um, at starvsfólk hjá býráðnum nú skulu dragast í løn fyri at fara í býin í privatum ørindum.

Niels Uni Dam sigur, at hetta ljóðar sum um, at starvsfólk hjá býráðnum kunnu fara í býin í privatum ørindum uttan at vera drigin í løn.

Og tí eru tað eisinmi nógv sum hava skotið teimum í skógvarnar, at skattgjaldarin skal betala starvsfólki hjá býráðnum løn, tá ið tey ganga í býnum í privatum ørindum og tað halda nógv er heilt órimiligt.

– Men hetta er ikki so, sigur Niels Uni Dam.

Hann sigur, at í heilt nógv ár hevur tað verið so, at starvsfólk hjá býráðnum eru drigin í løn, tá ið tey hava verið í býnum í privatum ørindum.

– Men tað nýggja er, at nú skulu tey eisini dragast í løn, tá ið tey eru hjá lækna, tannlækna, ella tá ið tey fara at fylgja líki, uttan tá ið talan er um næstu skyldfólk, sigur hann.

Hann sigur, at tað er hetta, sum stendur í nýggju reglununum, sum leiðslan í Tórshavnar Býráð ætlaði at seta í verk.

Higartil eru starvsfólkini sostatt ikki drigin í løn,. tá ið tey eru farin til lækna, tannlækna ella eru farin at fylgja líki.

Men hetta eru sotatt eisini einastu ørindi, sum starvsfólkini kunnu gera, uttan at verða drigin í løn, sigur hann

Søguligt handverk

Hannekiss dugur áramáling, men ikki mong gera honum listina eftir. Eini 40 ár eru síðani hann royndi hetta seinast

Mynd; D.Olsen

Í gamla skúlanum í Porkeri hava teir í longri tíð arbeitt við umvælingum, so skúlin kemur í upprunastand. Og so má boð sendast eftir serkønum, til dømis tá málast skal sum í gomlum døgum við áringum

HANDVERK
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Bygdasavnið í Porkeri hevur í fleiri ár arbeitt við verkætlan, sum hevur til endamáls at fáa gamla skúlan í uppruna stand.

Men ikki er altíð so lætt og ikki er altíð hvørsmansføri at fara undir slíkt arbeiði. Tá málast skal sum í gomlum døgum, er veruliga brúk fyri serkønum fólki.

Í eini skúlastovuni verður niðara helvtin av vegginum mála við áringum. Hetta merkir, at veggurin sær út, sum er hann klæddur við fínasta viði, men talan er um máling.

Tað er Johan Christian Dam, nevndur Hannekiss, sum er boðsendur till arbeiðið. Hann er upprunaliga úr Porkeri, men hevur starvast sum málari - mest í Havn - í eini 54 ár.

Hann metir, at tað eru eini 40 ár, síðani hann seinast royndi handverkið at mála áramáling.

Hann ásannar, at í slíkum føri er munurin lítil millum handverk og list. Ongin skitsa ella annað er at hyggja at, alt kemur frá málaranum sjálvum, men hóast Hannekiss ikki hevur roynt hetta í mong ár, so gekk skjótt at koma aftur á lagið.

Hann sigur, at tað hann veit, so er hann sjálvur annar í landinum, ið dugir hetta handverk í dag. Hetta er handverk, sum er við at fara í søguna, men ein kann fara á skúla í Danmark og aðrastaðni at nema sær kunnleika um handverkið.

Áramáling er oljubasis, men Hannekiss nýtir vatnbasis í Porkeri. Tað málað er, skal lakkast, tí annars kann alt skavast av aftur.

Fleiri serstakir penslar skulu nýtast og onkran hevur Hannekiss klipt til sjálvur, men onkur av penslunum hevur fylgt honum alla yrkisleiðina.

Eingin íbirting

Ov fáar kvinnur møttu í Stóra Pakkhúsi í Vági hóskvøldið, so einki ítøkiligt spurdist burturúr tiltakinum "Kvinnur sum íbirtarar" í hesum seinna umfarinum

Einki spurdist burtur úr fundinum "Kvinnur sum íbirtarar" í Stóra Pakkhúsi hóskvøldið. Ov fá møttu upp, men ætlanin er at gera enn eina roynd

ÍBIRTING
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Suðuroyar Skeiðsdepil í Vági hevði uppfylgjandi fund hóskvøldið undir heitinum "Kvinnur sum íbirtarar". Fyrri fundirin var fyri nøkrum vikum síðani og var uppmøtingin sera góð og hugskot og vóninar vóru góðar. Tá var meira talan um ein evnisdag.

Men á uppfylgjandi fundinum hóskvøldið, sum ætlandi skuldi snúgva seg um okkurt meira ítøkiligt, møttu bert eini 10 - 15 kvinnur.

- Tað kom ikki so nógv burturúr, sum vit høvdu vónað, sigur Rúna Hjelm, stigtakari.

Hon hevur sjálv roynd ir sum íbirtari og virkisleiðari og við tiltakinum vónar hon og hini í Skeiðsdeplinum at seta okkurt vinnuvirksemi í gongd, sum kvinnur eiga virknan leiklut í.

– Ymisk hugskot komu fram og vit fingu kjakast um ymisk viðurskifi, men vit mugu ásanna, at eftir hetta vónbrot mugu vit royna einaferð enn og kanska gera tiltakið áhugaverdari og umhugsa ein evnisdag afturat, sigur Rúna Hjelm.

Hugnakvøld á Sunda Bókasavni

Brúgvin um Streymin 30 ár

Í sambandi við at Brúgvin um Streymin varð 30 ár seinasta heyst, hevur Bókasavnið tikið stig til at savna nakað av tilfarið um tíðina, tá byggingin fór fram.

Hóskvøldið 26. februar klokkan 20 skipar Sunda Bókasavn fyri hugnakvøldið í Høllini í Norðskála-Oyrar skúla, har tilfarið verður lagt fram við fyrilestrum, blaðgreinum, myndasýning og ljósmyndasýning. Í steðginum verður kaffi og køkur at fáa.

Harafturat verða blaðgreinarnar, myndirnar og ljósmyndirnar vístar aftur leygardagin 28. februar og sunnudagin 29. februar, báðar dagarnar frá klokkan 16 til 18.

Øll eru væl komin.

Minnast Baden Powell

TÍÐINDASKRIV

22. februar er Hugsunardagur skótana, hesin dagur verur hildin við Guðstænastum kring landið. Hugsunardagur er tann dagur har skótar kring heim samlast til at minnast stovnararn av skótinum Lord Baden Powell og frú.

Guðstænastan í suðurstreymoy verður í Vesturkirkjuni kl 11.00. Prestur er Bergur D. Jensen, skótarnir vera bidnir um at møta 15 min áðrenn

KFUM - Skótarnir á Argjum
Skótalið´s KFUMs
Skótalið Sigmund Brestirssonar
KFUK skótarnir í Havn
Skótalið Freslunarhersins